LANDSKAPPING
**DYSTARSKRÁ 4 / 2024**

# H71

SUNNUDAGUR
**3. MARS**




**BURN: Sunnudagin 3. mars**

## KL.14.00 / H71 - Team Klaksvík

sms · SUÐUROYAR SPARIKASSI · ARTICON · WENZEL.FO · BÓNUS · INTERSPORT · BYGMA BALSLEV · TRYGD · ADVOKATFELAGIÐ



ODDAGREIN

# SEINASTA UMFAR Í GRUNDSPÆLINUM

*Mynd: Álvur Haraldsen / in.fo*

Seinasta umfar í grundspælinum hjá monnum og kvinnum er nú aftur av álvara í gongd, eftir at hava ligið nakað í dvala vegna steypakappingarnar og EM endaspælinum hjá monnunum í Berlin í januar. Soleiðis vera nú næstu vikurnar avgjørt hvussu grundspælið endar og hvussu ymisku liðini koma at plasera seg í mun til at leika fjórðing- og hálvfinalur í royndini at koma í endaligu finalurnar um føroyameistaraheitið 2023/24.

Hóast menninir ikki kvalifiseraðu seg til hálv- og finalurnar í steypakappingini, so hava vit hóast tað sæð hoyvíkingar leikt mannshondbólt í hesum steðgi, havandi í huga at bulurin á føroyska mannslandsliðnum er mannaður við hoyvíkingum, so í mangan mun er tað sum at síggja H71 leika, hóast í bláum og hvítum leikbúnum.

Hóast leikliga steðgin, so hava menninir vant dúgliga og hava eisini leikt onkran venjingardyst við góðum úrsliti, so formurin skuldi verið í lagi, hóast steðgin allan februar mánað.

Hjá monnunum er støðan í landskappingini góð og liggja vit heilt frammi í oddaspælinum við 19 stigum sum nummar tvey í kappingini, bert eitt stig aftanfyri fremsta liðinum VÍF. Sam-

stundis hava H71 og VÍF leikt ein dyst færri enn hini liðini. Menninir hava nú tríggjar dystir á rað uppá nýggju dagar, har leikast fyrst skal heima ímóti Team Klaksvík nú sunnudagin hin 3 mars, síðani heima aftur í oddadysti ímóti VÍF í Hoyvíkshøllini mikukvøldið 6. mars, og síðani á útivølli ímóti STÍF leygardagin 20. mars. Neyvan eydnast okkum at fáa fulla úrtøku úr hesum trimum dystum, men fáa vit 4 stig, so skuldu vit ligið væl fyri áðrenn tveir teir avsluttandi dystirnar í grundspælinum, har leikast skal ímóti Kyndli og Neistanum. Vit kunnu tá vónandi sjálvir avgera, um vit enda millum tvey tey fremstu liðini, og soleiðis fara beinleiðis til hálvfinalurnar ella skulu enda sum nr. 3 ella 4 og tí leika fjórðingsfinalu um at kvalifisera okkum til hálvfinalurnar.

Hjá kvinnunum stendur eisini rímiliga væl til í grundspælinum. Hóast vit hava haft nøkur ikki nøktandi tap, so eru vit nr. 3 og bert trý stig frá einum øðrum plássi, ið sum kunnugt gevur beinleiðis atgongd til hálvfinalurnar. Fýra dystir resta í, í grundspælinum og hava H71 kvinnurnar sunnudagin 10. mars truplan útidyst ímóti STÍF, sum hevur staðið seg væl í seinastuni. Skulu vit gera okkum vón um eitt endaligt annað pláss í grundspælinum fyri at kvalifisera okkum beinleiðis til hálvfinalurnar, so skal ikki bert dysturin ímóti STÍF vinnast, men eisini hinir tríggir írestandi, ímóti ávikavist Stjørnuni, Neistanum og Kyndli, umframt at Neistin skal tapa ein annan dystin. Hetta má metast at vera ein rímiliga brøtt mótbrekka, ið krevur leikligan stabilitet á høgum støði, skal tað eydnast - nakað vit til tíðir hava saknað hjá kvinnunum í vetur ikki mist skaðum hjá lyklaleikarum á liðinum at takka. Einki er tó liðugt fyrr enn alt er liðugt, so nú fáa vit at síggja hvussu leikur fer. Vit vóna tað besta.



*Mynd: Álvur Haraldsen / in.fo*


WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
WENZEL.FO


BANKNORDIK
Áhaldni gevur úrslit
Errin høvuðsstuðul hjá føroyskum hondbólti
Meira enn ein banki

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO




ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
**www.bilasolan.fo**

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**



HELGI HOYDAL

# HONDBÓLTSSKÚLIN VIÐ OKKARA HONDBÓLTSSTJØRNUM

*Fyriskiparar og venjarar til hondbóltsskúlan møtast áðrenn skúlin byrjar.*

## Ektað hondbóltsgleði

Tað var óivað ein súkkse í fjør tá hondbóltsskúlin hjá H71 varð hildin. Nógv børn gingu aftur, meðan fleiri nýggj andlit eisini vóru at síggja. Aftur í ár kundu vit lýsa við fleiri av okkara bestu leikarum uttanlands og heima í H71. Børnini møttu væl uppløgd at møta stjørnuspælarum úr Týsklandi, Svøríki, Danmark og Føroyum, sum skuldu venja tey í tveir dagar. Tað vóru sjálvsagt nógvir landsliðsbúnar at síggja á børnunum eisini. Fleiri teirra høvdu okkurt at skriva við, tí fleiri av landsliðsleikarunum sum skuldu til Berlin at spæla EM, skuldu vera venjarar aftur hesa ferð. Hetta má vera rekord, at so nógvir venjarar eru spurdir um at skriva autograf.

Vit høvdu sum undanfarna ár hallirnar á Hálsi, Gundadali, á Løgmannabreyt og í Hoyvík. Og so sjálvandi Fimi eisini. Tað riggar avbera væl, við góðari hjálp frá bussjaførinum í felagnum, at flyta børnini ímillum hallirnar.

Sum nakað nýtt í ár høvdu vit Hera Ziska við at skipa fyri kroppsligari venjing við teimum elstu børnunum. Sum honbólturin broytist sum spæl, so verður kroppslig styrki meira og meira avgerðandi. Tí valdu vit at leggja dent á hetta, við teimum sum eru nóg











gomul at fara í (nýggja og snotiliga) styrkirúmið við Hera. Børnini vóru væl nøgd, hóast onkur teirra helt tað var hart og avbjóðandi.
Tað er vakurt at síggja so nógv børn savnast um eitt spæl sum vit øll elska. Tey duga væl at venja, tey eru dugnalig og hugagóð, og tey læra eisini skjótt. Tann skipaða venjingin var væl gjøgnumførd, og tað stuttliga er at síggja tá børnini hava frí, hvussu skjót tey eru at skipa spøl sína millum. Øll noyðast ikki eitt mál, ella eina linju á vøllinum fyri at skipa okkurt saman við hondbóltinum í fokus. Telefonirnar fáa frið, uttan at nakar sigur tað við tey.
Vit síggjast aftur um jólini!












MOURITSEN'S BUSSAR









# Okkara hondbóltsstjørnur



## Pauli Mittún og Marita Mortensen

★★★★★

# Pauli Mittún

Ein vanligan dag, vakni eg kl.07.00 og geri mær kaffi - so er dagurin skotin í gongd. So fari eg í skúla, har eg havi undirvísing á CBS frá kl.08.00 til uml. kl.12.00-13.00. Aftaná skúla, hava vit hondbóltssvenjing um 14.00-15.00 tíðina - vanlig venjing er í 2 tímar. Tá ið venjingin so er liðug, plagar matur at standa klárur til okkum at antin taka við ella eta í høllini. Aftaná gongur leiðin heim, har tað antin er lesnaður/heimaarbeiði ella okkurt sosialt við damu ella vinfólki á skránni. Eg eri so heppin, at eg búgvi á Oyrasundskollegiunum, so tað er serstakliga stutt til fleiri føroyingar. Mær dámar tað ordiliga væl, og kundi ikki ímynda mær at búð aðrastaðni.

Á dystardegi, er tað í veruleikanum ikki serliga øðrvísi. Er dysturin ein gerandisdag, so sær dagurin líka út, men venjing er skift út við dyst. Er tað í vikusskiftinum, so plaga vit at spæla fyrr á degnum, og mær dámar ikki at gera nakað serligt burtur úr. Eg vakni tá tað passar mær, fái mær okkurt at eta, og so fari eg til dyst.

Eg spæli í 1. division, sum er næstbesta deildin í Danmark. Tvs. at tað er ikki toppurin av donskum hondbólti, og merkir man stóran mun, tá man spælir ímóti liðum í bestu deildini, í eitt nú venjingardystum og steypadystum. Hóast tað, so er deildin javnt góð, og eru allir dystir, ein dystur ið ber til at tapa. Øll liðini hava dugnaligar leikarar, og er stóri munurin millum at spæla her og í Føroyum, fysikkurin, ferðin og aldurin á leikarum. Í 1. division hava øll

liðini tilkomnar leikarar, sum hava spælt í fleiri ár, meðan í Føroyum eru flest øll liðini domineraði av serstakliga ungum leikarum.

Tá tað so er sagt, so er tað stuttligt og avbjóðandi at spæla her. Vit hava ein góðan heimabana, og eru har so at siga altíð uml. 800 áskoðarar til dystirnar hjá okkum. Har er góður stemningur og eiga vit ein tann keðiligasta útibanan at spæla á hjá øðrum liðum. Tá vit so skulu til útibanadystir, plagar ferðingin at liggja um 3 tímar hvønn vegin. Nøkur halda hetta vera leingi, men fyri meg eru hesir tímarnir kærkomnir. Orsøkin er tann, at eg fái lisið og gjørt nógv heimaarbeiði ímeðan við ferðast.

Tá eg ikki venji hondbólt fer tíðin við heimaarbeiði og vinfólki. At búgva í Keypmannahavn á Oyrasundskollegiunum, er eitt sindur tað sama sum at búgva í Hoyvík. Man møtir altíð fólki sum man kennir, so tað er lætt at fella til. Eg brúki ikki nakra serliga tíð við liðfeløgunum uttanfyri hondbóltin, og tað er nokk tí at fleiri av mínum vinmonnum eisini búgva í Keypmannahavn.

Í stórbýnum ber so at siga alt til, og tá flestu dystirnir hjá okkum verða spældir antin fríggjakvøld ella tíðliga á degnum leygardag, hevur man eitt langt vikusskiftið at hugna sær við vinfólki og øðrum. Tað at dystirnir ikki verða spældir sunnudag, eins og flest allir dystir verða í Føroyum, er nokk ein tann størsti og besti munurin við at spæla í Danmark.



# Marita Mortensen

Í summar flutti eg niður til Keypmannahavn lesa á hægri lesnað. Min gerandisdagur er sera nógv broyttur síðan eg fór at spæla hondbólt við HØJ Elitehåndbold. Mítt fyrsta hálva ár vandi eg við If Føroyum, sum mær dámdi sera væl. Eg saknaði tó at spæla hondbólt á einum hægri støði, har mótstøðan var munandi betur.

Sum sagt er min gerandisdagur nógv tengdur av skúla og venjing. Ongin dagur er líka, nakrir meira spennandi enn aðrir. Eg búgvi í løtuni á Oyraundskolleginum á Amager, har eg framleigi eina íbúð, tá eg sjálv ikki havi fingið ein fastan búðstað enn, men vónandi fari eg skjótt at fáa okkurt. Her trívist eg væl millum føroyingarnar, samanhaldi er gott og tað er so deiliga skjótt at leypa inn til hvønn annan.
Eg lesi lívfrøði, sum er ein bachelor útbúgving á Københavns Universitet. Her eri eg til undirvísing næstan hvønn gerandisdag, har eg luttaki í nógvum spennandi fyrilestrum og undirvísingum. Við skúlanum fylgja sjálvandi eisini nógv skúlating, har nógv tíð fer til.

Hvønn mánadag og týsdag møti eg tíðliga á skúlanum og havi venjingarklæðir við. Eftir skúlatíð møtist eg við nøkrum liðfelagum, og har vit síðani koyra saman til venjing. Vit venja í Ølstykke og Jyllinge, sum tekur uml. 50 min at koyra úr Keypmannahavn. Vit venja 3 ferðir um vikuna hondbólt, og passa styrki venjingarnar sjálvar. HØJ Elitehåndbold er eitt sera spennandi felag. Tey leggja stóran dent á samanhald, og hava tí eisini nógv tiltøk. Liðið sum eg eri við, spælir í 1.division. Tær fluttu frá 2.div til 1.div í 2023, so hetta er fyrsta kappingarár í næst bestu deildini. Her trívist eg bara heilt væl, sjálvt um eg ikki havi verið her serliga leingi.

Leygardagin 24. feb. vóru vit og spældu dyst í Viborg, ímóti Søndermarken IK. Hetta var ein av teimum longru buss túrunum. Vit spældu ein góðan fyrsta hálvleik og førdu við fimm málum meginpartin av dystinum, men teir síðstu fimtan minuttirnir blakaðu vit sigrin frá okkum og dysturin endaði 30-29 til SIK. Tað er altíð keðilgt at tapa, og tá man hevur ein 4-5 tímar busstúr aftaná, er tað bara ikki serliga stuttligt... Eg siti her sunnumorgun og dysturin fyllur enn nógv í tonkunum. Hvør dystur fyllur ikki líka nógv, men hesin var ein sera umráðandi dystur, sum vit skuldu vinna. Hetta er eisini ein partur av hondbóltinum.

Tað er øðrvísi at spæla hondbólt her í mun til heima í Føroyum. Sum tað fyrsta, fer nógv tíð av til at súkkla og koyra aftur og fram frá venjing og dyst. Sum tað næsta er tað øðrvísi á tann hátt, at man

møtir nógv fleiri liðum og spælarum. Heima í Føroyum kennir man altíð sítt mótstøðu lið, og hevur spælt ímóti teimum fyrr.

Dagarnir eg havi frí frá hondbóltsvenjing, brúki eg uppá at gera skúlating, renna ein túr ella eri saman við vinum/familju. Eg eri so heldig at hava nógv góð vinfólk og familju rundan um meg her á Oyrasundskollegiunum.
Eg havi ein sera pakkaðan/travlan gerandisdag, og føli næstan ikki at eg havi tíð til at leingjast heim. Eg sakni sjálvandi mína familju heima í Føroyum, men vit tosa saman hvønn dag. Leivur (mín beiggi) býr her saman við damuni, so tað er deiliga skjótt at leypa inn til tey at fáa sær okkurt.

Eg kann heilt vist viðmæla at fara til Keypmannahavn at lesa og spæla hondbólt. Tað er sera mennandi fyri meg sum leikara, og eisini sum einstakling. Eg trívist væl bæði á og uttanfyri vøllin, og síggi fram til nøkur góð ár fyri framman her í Keypmannahavn.











Vit raka málið!


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Haldfør
Nýggj
vøra!
SENDISTOVAN
MBM

NÝGGJA ÆTTARLIÐIÐ AV HITAPUMPUM

Hóskar til bæði ný- og umbygging.



VIESSMANN

LEIF MOHR
LM.FO tlf. 35 12 20





| | |
|---|---|
| 1 | Rúna Jógvansdóttir Larsen |
| 2 | Elsa Egholm |
| 5 | Alda Gilladóttir |
| 7 | Anna Elisabeth H. Weyhe |
| 8 | Karin Egholm |
| 9 | Poula Fríðheim Petersen |
| 11 | Lukka Arge |
| 12 | Alda Av Skarði |
| 13 | Inga Maria Joensen |
| 17 | Tórhalla Thorsteinsson |
| 18 | Teresa Jacobsen |
| 20 | Christina Turiðardóttir Arge |
| 25 | Sára Jacobsen |
| 99 | Guðrið á Borg |
| 24 | Lea Brockie |

**Venjari:** Petra Freislerova
**Hjálparvenjari:** Mathias Rettig
**Liðleiðari:** Ann Ellefsen
**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Ingilín Holm

sms

## SMS KAPPINGIN - KVINNUR

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Kyndil | 17 | 548 | 417 | 131 | 31 |
| 2. | Neistin | 17 | 537 | 440 | 97 | 23 |
| **3.** | **H71** | 17 | 531 | 459 | 72 | 23 |
| 4. | Stíf | 17 | 498 | 477 | 21 | 22 |
| 5. | Víf | 17 | 509 | 469 | 40 | 18 |
| 6. | Stjørnan | 17 | 430 | 530 | -100 | 8 |
| 7. | EB | 17 | 439 | 530 | -91 | 7 |
| 8. | VB | 17 | 407 | 577 | -170 | 1 |



1 Torstein Sivertsen
3 Louis Christy
5 Rói Seyer Hjaltason
9 Jón Rói Mohr Høgnesen
12 Jákup Johannesen
15 Haraldur Karlsson
16 Ingi Johannesen
17 Helgi Poulsen
18 Helgi Jakob Halldorsson
20 John Skaalum Vilhelm
23 Høgni Højsted
30 William Napoleon Djurhuus
31 Sveinur Olafsson
33 Magnus Carlsen
38 Sjúrður Seyer
39 Rókur Ziskason
44 Sakaris Aniano Sakarisson
47 Ísak Vedelsbøl
55 Rói Thomsen
71 Bogi Hansen
91 Jógvan Andrias Lamhauge

**Venjari:** Mark Marcher
**Hjalparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Málmansvenjari:** Ári Dam
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen
**Liðleiðari:** Villiam Waag
**Mentalvenjari:** Jens á Skipagøtu

BURN FITNESS

## BURN KAPPINGIN - MENN

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Víf | 13 | 421 | 351 | 70 | 20 |
| **2.** | **H71** | **13** | **395** | **332** | **63** | **19** |
| 3. | Kyndil | 14 | 393 | 362 | 31 | 17 |
| 4. | Neistin | 14 | 371 | 379 | -8 | 16 |
| 5. | Kíf | 14 | 363 | 379 | -16 | 13 |
| 6. | Stíf | 14 | 394 | 433 | -39 | 6 |
| 7. | Team Kl. | 14 | 348 | 449 | -101 | 5 |

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN


MAGN
BURG
ARIN
magn



ELSUBETH M. FOSSADAL

# HANN VAR VIÐ Í BERLIN

*H71 D14 avmyndaðir saman við týsku hondbóltsdreingjunum.*

## Ja, sjálvsagt var hondbólturin eisini við í Berlin!

Dreingir 14 hjá H71 hava altíð hondbóltin við á ferð. Hvønn dag í viku verður taskan pakkað væl, bæði til venjing og til dyst. Mikudag, hósdag, fríggjakvøld, leygarmorgun og sjálvt jólaaftan kunnu dreingirnir finna uppá at fara í høllina at venja við yndisbóltinum.

Jólini 2023, undan føroyska Berlin bragdinum, høvdu dreingirnir, allir sum ein, fingið ein bleytan pakka í jólagávu. Í pakkanum var ein hvít landsliðsblusa at fara í at hyggja eftir hondbóltsstjørnunum í Berlin. Eina eyka jólagávu fingu U14 dreingirnir, tá teir frættu, at teir eisini skuldu spæla dyst í Berlin. Ein H71 pápi fekk nevniliga besta jólagávuhugskotið. Eina jólanátt skipaði hann fyri trimum dystum móti sterku berlinaraliðunum: Pfeffersport, Füsche Berlin og SG OSF Berlin. Slíkar jólagávur kunnu ikki keypast fyri pening!

Januar 2024 gekk leiðin til Berlin. Dreingirnir allir pakkaðu hondbóltin og H71 klæðini í sítt hondviðføri saman við nýggju landsliðsblusuni. Nú vóru dýrgripirnir í tryggum hondum í hondviðførinum, um nú eitthvørt kuffert bleiv burtur á ferðini til Týsk-

lands. Øll komu fram í øllum góðum og saman við hinum 5000 føroyingunum varð lagt upp til eina spennandi og hendingarríka viku í Berlin.
Dagin eftir fyrsta EM dystin nakrantíð, fríggjadagin 12.januar møttu dreingirnir í Füsche Town til dyst móti Füsche Berlin. Í Füsche Town fingu teir góða týska móttøku og høvið at síggja skiftingarrúmið hjá Hákuni West av Teigum, Hans Lindberg, Mathias Gidsel og øllum hinum stjørnunum. Dreingirnir vunnu dystin móti Füsche Berlin 35-28 við rimmar stuðli frá stóru H71 fjepparafjøldini. Longu dagin eftir leygardagin 13/1 gekk leiðin til Kniprodehstraße 27 at spæla móti Pfeffersport. Pfeffersport átti eina nýggja vakra nútímans høll við øllum hentleikum. Har var so fínt, at harpiks var bannað at brúka. Fjepparafjøldin var aftur til dystin fús, og tað vóru dreingirnir eisini, hóast teir saknaðu harpiksið. Vit vunnu dystin 36-30. Sama dag spældu D16 eisini ein spennandi og undirhaldandi dyst móti sínum Pfeffersport javnaldrum. Í fyrra hálvleiki var støðan 19-12 til





okkara dreingir, og H71 vann aftur ein greiðan sigur. Dagurin endaði í Mercedes Benz Arena saman við hinum 5000 føroyingunum. Og lítið vistu vit til dystin móti Pfeffersport, at hetta fór at gerast søguliga leygarkvøldið, tá vit vunnu okkara fyrsta EM stig.
Sunnudagin 13/1 var møði á monnum og kvinnum aftaná longu veitslunáttina í Berlin. Nakrir H71 fjepparar høvdu kortini leitað sær við aftur í dag til Louis-Zobel-Sporthalle, Geisbergstraße at stuðla dreingjunum at spæla seinasta vinardystin móti SG OSF-Berlin. Spælið var javnt fyrstu 15 minuttirnar, men síðani øktu vit bara um munin. SG OSF-Berlin mátti lúta, og dysturin endaði 37-26. Tá okkara dreingir aftan á dyst fóru í bað, ja, tá fóru berlinaradreingir og berlinaravenjari í hált við at vaska høll, gólv og alt harpiks burtur aftur, áðrenn teir útlúgvaðir fóru í bað.
Á túrinum í Berlin fingu H71 dreingirnir høvið at hitta týskar javnaldrar, sum brenna líka nógv fyri hondbóltinum, sum teir. Dreingirnir fingu møguleikan at spæla í teirra hallum.







Og teir fingu góða og hátíðarliga móttøku frá sera fryntligum týskarum. Foreldrini og aðrir H71 fjepparar í Berlin fingu samstundis høvið at hittast í berlinarahøll og njóta berlinarakaffi, meðan dreingirnir spældu tríggjar mennandi sigursdystir. Teir vunnu allar tríggjar dystirnar sannførandi. Ein dystin spældu teir, sum nevnt uttan harpiks. Teir saknaðu harpiksið, men gjørdu sítt besta, hóast bólturin ikki altíð sat, har hann plagdi. Teir vóru ernir og glaðir at vinna á trimum sterkum berlinaraliðum, men mest av øllum fingu teir eina stuttliga uppliving. Teir fingu høvið at royna sín bólt og sínar snildir í Berlin við og uttan harpiks. Teir fingu styrkt um vinarbondini teirra millum, og teir fingu styrkt um H71 felagsskapin, nú vit so nógv vóru í Berlin í senn. At flest okkara eisini fingu berlinarakrím heim við aftur til Føroya, kunnu vit bert flenna eftir, nú tá vit aftur og aftur fara at minnast aftur á okkara ógloymandi dagar í Berlin januar 2024.

Vinardystirnir í Berlin kunnu síggjast á Youtube: TheRaffar










VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000




HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

FAROE SHIP


LAIDERZ
Fokus på sportsfaciliteter
VALLIRNIR VIÐ LØKIN OG
UNDIR MÝRUHJALLA
Í RUNAVÍKAR KOMMUNU
Einastu vallir í Føroyum sum eru 100 %
endurnýtslubarir.
Báðir FIFA QUALITY PRO góðkendir




FOKUS
18:29
Lætt og stuttligt
Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta
ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI










DESIGNA KØKAR BORG | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO




SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
sendistovan
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Tak appina
niður her
Fyll á og
koyr víðari
effo
appin





# Heildar-loysnir frá ArtiCon

HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn


Heinta
2 fyri 1 appina
niður her
App Store
Google Play
Fartelefonhald
við fleiri fyrimunum
frá Nema
Nema kundar kunnu við 2 fyri 1 appini bjóða einum vini í biograf, bovla, eta burgara, og nógv annað púrasta frítt.
2 fyri 1
Biografur
2 fyri 1
Burgara
2 fyri 1
Bovling
www.nema.fo I Tlf. 20 20 20 I nema@nema.fo
nema

# Frítíðin byrjar umborð



Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

NORÐOYA SPARIKASSI

# Grønt bústaðarlán

Hevur tú bústað við grønari orkuskipan, t.d. jarðhita, fjarhita ella hitapumpu, er Grøna bústaðarlánið ein góð og bílig loysn.

Við Grøna bústaðarláninum fært tú lægri rentu. Tú kanst leggja títt vanliga Bústaðarlán um til eitt Grønt bústaðarlán, um bústaðurin hevur grøna orkuskipan.

Lánið hevur broytiliga rentu og fasta afturgjaldstíð.

Les meira á ns.fo.



Norðoya Sparikassi
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000
ns@ns.fo
ns.fo

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD




©NUDLAVIRKIÐ

hiddenfjord.com


SISU
SKORA
VIÐ
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt


ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo



WAAG

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP